Skráseting Føroya

Skráseting Føroya

# Leiðreglur fyri próvtøku fyri góðkendar grannskoðarar 2023-

Dagført
01-11-2023

Skráseting Føroya · Sigmundargøta 13 · Boks 264 110 Tórshavn · Tlf.: +298 356010 · Fax: +298 356015 · E-mail: skr@skraseting.fo

# Innihaldsyvirlit

Innleiðing ..... 2
Treytir fyri at sleppa til próvtøku ..... 2
Tilmeldingarfreistir o.a. ..... 3
Um próvtøkuna ..... 3
Próvtøkuinnihald ..... 4
Um próvdømingina ..... 5
Klagur um próvdøming ella próvtøku ..... 6
Um Próvtøkunevndina ..... 6
Serlig undantøk ..... 6
Treytir fyri at gerast løggildur grannskoðari ..... 7
Leinkjur ..... 7

# Innleiðing

Leiðreglurnar hjá Próvtøkunevndini og Skráseting Føroya áseta nærri mannagongdir fyri próvtøkuna fyri góðkendar grannskoðarar, sbrt. kunngerð nr. 121 frá 23. august 2022 um próvtøku o.a. fyri góðkendar grannskoðarar ("próvtøkukunngerðin") og løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir ("grannskoðaralógin").

Sambært § 31, stk. 5 í grannskoðaralógini og § 12 í próvtøkukunngerðini kunnu Próvtøkunevndin og Skráseting Føroya gera avtalu við Erhvervsstyrelsen og Foreningen for Statsautoriserede Revisorer ("FSR" ) um samstarv í sambandi við próvtøkuhald og próvtøkudøming.

Formlig avtala er gjørd um hesi viðurskifti, soleiðis at próvtøkan til løggildan grannskoðara í Føroyum er tann sama sum skrivligi parturin av próvtøkuni til statsautoriseraðan revisor í Danmark í próvtøkuárinum. Harumframt er avtalað, at próvdømingin fer fram við somu próvhoyrarum/próvdómarum, og at próvtakarar fáa yvirvøku- og innlatingarskipanina til próvtøkuna útflýggjaða beinleiðis frá FSR.

Munnliga próvtøkan til statsautoriseraðan revisor í Danmark er *ikki* partur av próvtøkuni til løggildan grannskoðara í Føroyum.

Til tess at tryggja, at próvtøkan í Føroyum í størstan møguligan mun verður hildin eftir sama leisti sum skrivliga próvtøkan í Danmark, hava Próvtøkunevndin og Skráseting Føroya gjørt av, at leiðreglurnar hjá FSR eisini skulu galda fyri próvtøkuna til løggildan grannskoðara í Føroyum, og at próvtøkan annars verður hildin á sama hátt sum í Danmark.

Tað er umráðandi at tú, umframt at lesa hesar leiðreglur, eisini setir teg inn í mannagongdirnar fyri skrivligu próvtøkuna til statsautoriseraðan revisor í Danmark, sí leinkjur:

FSR – Foreningen for Statsautoriserede Revisorer: https://www.fsr.dk/

FSR – Leiðreglur fyri próvtøku: https://www.fsr.dk/uddannelse-events/revisoreksamen/om-revisoreksamen/retningslinjer

## *Treytir fyri at sleppa til próvtøku*

Fyri at sleppa til próvtøku at gerast løggildur grannskoðari skalt tú, í seinasta lagi 1. juni í próvtøkuárinum lúka fylgjandi treytir:

1. Tú skalt hava lokið grannskoðarakandidatpróvtøkuna, cand.merc.aud.
2. Tú skalt hava lokið prógv í føroyskum skattarætti á universitetsstigi[1]
3. Tú skalt, **í minsta lagi í 3 ár** eftir at hava fylt 18 ár, hava tikið lut í uppgávum, sum eru innan virkisøkið hjá góðkendum grannskoðarum, sbr. § 1, stk. 2 og 3 í grannskoðaralógini, undir eftirliti av einum góðkendum grannskoðara á einum góðkendum grannskoðanarvirki. **Í minsta lagi 1 ár** skal vera gjøgnumført eftir, at kandidatútbúgvingin er staðin, og **í minsta lagi 2** ár skulu vera gjøgnumførd **innan fyri tey seinastu 3 árini** undan freistini fyri tilmelding til grannskoðarapróvtøkuna. Hendan treyt verður eisini mett at vera lokin, um so er at próvtakarin, í seinasta lagi áðrenn próvtøkan byrjar, skjalprógvar at luttøkan er gjøgnumførd. Skjalprógv fyri luttøkuni skal fáast til vega frá arbeiðsgevaranum, t.e. leiðsluni í grannskoðaravirkinum.

Um tú ikki hevur staðið grannskoðarakandidatpróvtøkuna, cand. merc. aud, so kanst tú melda teg til próvtøku um tú lýkur upptøkukrøvini til cand. merc. aud, og hevur staðið aðra kandidatútbúgving, sum inniheldur lærugreinar í grannskoðan, roknskapi, skatti og vinnurætti, sum samsvara við lærugreinarnar á cand.merc.aud-útbúgvingini og fevna um í minsta lagi 60 ECTS-stig.

[1] Lærugreinin verður vanliga bjóðað út á Fróðskaparsetrið Føroya.

Tað er ein treyt, at tú fært til vega eitt ummæli frá einum útbúgvingarstovni, ið bjóðar út cand.merc.aud-útbúgvingina, har váttað verður fyri, at tín útbúgvingin lýkur hesi krøv.

Hevur tú arbeiðsroyndir frá einum øðrum landi enn Føroyum, kann Skráseting Føroya geva undantak frá treytini um at taka lut í uppgávum, sum eru innan virkisøkið hjá góðkendum grannskoðarum, samsvarandi einari ítøkiligari meting av tínum royndum. Umsókn um undantaksloyvi skal vera Skráseting Føroya í hendi í seinasta lagi 1. mai í próvtøkuárinum.

## *Tilmeldingarfreistir o.a.*

Próvtøka verður hildin eina ferð um árið, í seinna hálvári, um umsøkjarar eru, sum lúka treytirnar.

Tilmeldingarfreistin er 1. juni í próvtøkuárinum.

Próvtøkan til løggildan grannskoðara verður hildin somu dagar, sum skrivligi parturin av próvtøkuni til statsautoriseraðan revisor verður hildin í Danmark. Á heimasíðuni hjá FSR ber til at síggja, nær próvtøkan verður hildin.

Um umsøkjarar eru, sum lúka treytirnar fyri at sleppa til próvtøku, so fáa hesir nærri boð frá Skráseting Føroya.

Avboð frá próvtøkuni skal vera Skráseting Føroya í hendi í seinasta lagi 7 álmanakkadagar, áðrenn próvtøkan verður hildin.

# Um próvtøkuna

Próvtøkan til løggildan grannskoðara er ein skrivlig roynd yvir tveir dagar, har hvør dagur varir í seks tímar. Próvtøkuuppgávan er á donskum, og skal svarast á donskum.

Próvtøkan verður hildin í hølum, sum Skráseting Føroya hevur fingið til vega til endamálið, vanliga á einum útbúgvingarstovni í Føroyum.

Fyri próvtøkuna til løggildan grannskoðara í Føroyum eru tær til eina og hvørja tíð galdandi leiðreglur fyri próvtøkuna til statsautoriseraðan revisor í Danmark galdandi. Hetta merkir millum annað at:

- Próvtakari skal møta í góðari tíð, og í seinasta lagi 30 minuttir áðrenn próvtøkan byrjar.
- Próvtøkan er undir eftirliti, heruppií við yvirvøku av telduskipanum hjá próvtakaranum undir royndini.
- Próvtakari skal sjálvur hava teldu við til próvtøkuna, har talgilda eftirlitsskipanin hjá FSR (ITX-Flex) *frammanundan* er løgd á telduna. Tað er í hesum sambandi umráðandi, at aðrar skipanir, t.d. trygdarskipanir á arbeiðsteldum, ikki avmarka ella forða fyri nýtsluni av eftirlitsskipanini. FSR sendir próvtakaranum leinkju til skipanina í góðari tíð áðrenn próvtøkuna. Um so er, at tekniskir trupulleikar koma fyri áðrenn próvtøkuna, so er tað próvtakarin, ið skal seta seg í samband við FSR hesum viðvíkjandi.
- Undir próvtøkuni hevur próvtakarin fulla atgongd til internet, men einans tær heimasíður, sum eru loyvdar sambært leiðreglunum hjá FSR, umframt fylgjandi føroysku heimasíður eru loyvdar:

  - www.taks.fo
  - www.skraseting.fo
  - www.logir.fo
  - www.logting.fo
  - www.sprotin.fo

- Próvtakari ber ábyrgdina fyri, at allar skipanir, ið hava atgongd til internet, eru sløktar tá ið próvtøkan byrjar, heruppií MicroSoft Teams, Zoom, Skype, o.tíl.

- Tað er ikki loyvt at samskifta við onnur undir próvtøkuni. Forboðið fevnir um alt samskifti, tað verið seg munnliga, skrivliga, umvegis samskiftistøkni, við flyting/móttøku av dáta ella á annan tøkniligan hátt. Sum samskifti verður eisini roknað samskifti við, ella nýtsla av talgildum vitlíki (AI), til dømis ChatGPT ella líknandi.

- Telefonir og onnur samskiftistól heruppií geymar, iPads, Apple Watches, o.a. skulu sløkkjast og latast próvtøkuvaktunum áðrenn próvtøkan byrjar.

*Listin omanfyri er ikki tømandi. Víst verður til leiðreglurnar hjá FSR, ið eru tøkar á heimasíðuni hjá felagnum*[2].

### Loyvd hjálparamboð o.a.
Við teimum avmarkingum, ið eru nevndar omanfyri, hevur próvtakari rætt til at nýta øll hjálpartól í samband við próvtøkuna.

Próvtakari hevur rætt til at hava eina eyka teldu við sær til próvtøkuna, sum kann nýtast, um tøkniligir trupulleikar koma fyri. Tað er ein treyt, at báðar teldurnar lúka krøvini, ið eru nevnd omanfyri.

Um so er, at tøkniligir trupulleikar bera við sær, at teldurnar ikki kunnu nýtast, hevur próvtakari rætt til at lata eitt svar inn, ið er skrivað við hond.

### Útflýggjan av próvtøkuuppgávuni og avhendan av próvtøkusvarinum
Eru ikki onnur boð givin frammanundan, verður próvtøkuuppgávan útflýggjað sum fysiskt kopi.

Próvtøkusvarið skal avhendast umvegis KT-skipanina hjá FSR, áðrenn próvtøkutíðin er liðin. Próvtakarin skal tryggja sær, at KT-skipanin hevur váttað fyri móttøku av próvtøkusvarinum, áðrenn farið verður úr próvtøkuhølunum.

### Eftirlit
Próvtøkuvaktirnir hava rætt til at fremja eftirlit við telduni hjá próvtakaranum undir próvtøkuni. Eyka tíð verður latin samsvarandi tíðarnýtsluni til eftirlit.

### Brot á leiðreglurnar
Brot á hesar leiðreglur, og/ella brot á leiðreglurnar hjá FSR, kann bera við sær burturvísing frá próvtøkuni og/ella at próvtøkuavrikið ikki verður góðkent. Hetta er galdandi uttan mun til, um brotið er staðfest undir próvtøkuhaldinum, ella eftirfylgjandi.

## Próvtøkuinnihald
Royndin kann innihalda eina samanseting av spurningum við longum svarum, spurningum við stuttum svarum, fleirvalsuppgávum, multiple choice, og útrokningum innan fyri hesi øki:

1. Fakligan etikk og óheftni, heruppií starvstøku og fráfaring, góðtøku av umbidna arbeiðinum, frágreiðing um fíggjarlig brotsverk, tagnarskyldu og góðskustýring.
2. Grannskoðan og fakligar førleikar.
3. Rættarlig krøv og fakligar standardar fyri grannskoðan og at geva aðrar váttanir.
4. Altjóða grannskoðanarstandardar.
5. Alment roknskaparástøði og roknskaparmeginreglur.
6. Rættarlig krøv og standardar fyri gerð av ársroknskapum og samtaksroknskapum.
7. Altjóða roknskaparstandardar.
8. Roknskapargreiningar.

---
[2] Nærri kunning fæst á heimasíðuni hjá FSR: https://www.fsr.dk/uddannelse-events/revisoreksamen/om-revisoreksamen/retningslinjer

9. Rakstrarbókhald og innanhýsis roknskap.

Harumframt skal eitt ella fleiri av hesum fakligu økjum skulu vera partur av próvtøkuni *í tann mun, tað hevur týdning fyri grannskoðan ella at geva aðrar váttanir*:

1. Vinnufelagsrættur og virkisleiðsla.
2. Konkursrættur og reglur um líknandi búviðgerðir.
3. Skattarættur.
4. Borgarligur rættur og vinnurættur.
5. Arbeiðsrættur og lóggáva um sosiala trygging.
6. Kunningartøkni og telduskipanir.
7. Rakstrarbúskapur, samfelagsbúskapur og fígging.
8. Støddfrøði og hagfrøði.
9. Grundleggjandi meginreglur fyri fíggjarliga stýring av fyritøkum.

# Um próvdømingina

Próvhoyrarar og próvdómarar til próvtøkuna til løggildan grannskoðara í Føroyum vera úttiknir av FSR millum teir próvhoyrarar og próvdómarar, ið døma skrivligu próvtøkuuppgávurnar til statsautoriseraðan revisor í Danmark í próvtøkuárinum.

Próvhoyrari og próvdómari fáa ikki at vita frammanundan, at talan er um føroyskan próvtakara.

Við próvdømingina verður nýtt metingin: staðin ella ikki staðin. Dømingin fer fram eftir sama leisti sum í Danmark, tað er, at próvhoyrari og próvdómari meta um úrslitið við støði í einari rættivegleiðing. FSR skrivar soleiðis í punkt 4.1.1. í leiðreglum sínum fyri 2022:

> "I sin besvarelse skal eksaminanden stræbe efter at besvare opgaven praksisnært og forståeligt for modtageren. Hvis det i opgaveteksten forlanges, at eksaminanden skal udarbejde et notat eller en redegørelse til en bestyrelse, skal dette forstås direkte. Besvarelsen skal formuleres, som om det var et notat eller en redegørelse til bestyrelsen, og sproget skal derfor være forståeligt for almindeligt kyndige bestyrelsesmedlemmer. Eksaminanden må her forestille sig, at læseren er en kunde, hvorfor fagsprog og ikke alment kendt terminologi bør undgås. Bemærkningerne i nærværende afsnit gælder, når der tale om besvarelser rettet til en konkret modtager.
>
> Er en opgave eller en del af en opgave spørgsmål med lange svar, spørgsmål med korte svar, multiple choice eller beregninger, skal besvarelsen udformes i overensstemmelse hermed.
>
> Bedømmelsen foretages dels på grundlag af det faglige indhold af opgavebesvarelsen, dels på grundlag af i hvilket omfang det er lykkedes for eksaminanden at udarbejde en besvarelse, der har den fornødne værdi for modtageren. I denne forbindelse bemærkes, at der lægges vægt på eksaminandens evne til at disponere og prioritere besvarelsen efter væsentlighed.
>
> Ved bedømmelsen af besvarelsen foretages også en helhedsvurdering af eksaminandens faglige niveau og evne til at levere en korrekt besvarelse, der har værdi for modtageren."

Rættivegleiðingin verður eftirfylgjandi løgd út á heimasíðuna hjá FSR.

Próvhoyrari og próvdómari skulu sum liður í próvdømingini skriva notat um avrik og metingina av úrslitinum. Notati verður at nýta í samband við viðgerðina av einum møguligum klagumáli.

Skráseting Føroya kunnar próvtakaran um úrslitið frá próvtøkuni.

### *Klagur um próvdøming ella próvtøku*

Sambært § 12 í próvtøkukunngerðini kann próvtakari klaga um próvtøkugrundarlagið, próvtøkugongdina, próvdømingina ella rættarligar spurningar annars. Klagan skal vera skrivlig og grundað, og skal vera Skráseting Føroya í hendi í seinasta lagi 14 dagar eftir, at próvtøkuúrslitið er fráboðað próvtakaranum.

Viðvíkur klagan próvdømingini ella viðurskiftum viðvíkjandi teimum, ið hava próvdømt, leggur Skráseting Føroya klaguna fyri próvhoyrara og próvdómara, ið fáa eina freist upp á tvær vikur at geva úttalilsi um próvdømingina o.a., undir hesum at gera tilráðing viðvíkjandi klaguni.

Mælt verður til, at ein møgulig klaga verður orðað á donskum.

Próvtakarin fær høvi til at gera viðmerkingar til úttalilsið frá próvhoyrara og próvdómara innan eina freist upp á í minsta lagi eina viku.

Próvtøkunevndin tekur avgerð grundað á úttalilsið frá próvhoyraranum og próvdómaranum og viðmerkingunum hjá próvtakara. Avgerðin hjá Próvtøkunevndini kann fevna um: 1) nýggja próvdøming, 2) nýggja próvtøkuroynd, ella 3) at klagarin ikki fær viðhald í klaguni.

## Um Próvtøkunevndina

Skráseting Føroya setur Próvtøkunevndina fyri løggildar grannskoðarar. Próvtøkunevndin er sett saman við 5 limum, harav einum limi, ið er løggildur grannskoðari, og 4 limum, ið ikki eru løggildir grannskoðarar, sum skulu vera kønir í handilsviðurskiftum, skattarætti, skiftirætti og tjóðarbúskapi.

Av teimum fýra limunum, sum ikki eru løggildir grannskoðarar, útnevnir Skráseting Føroya ein teirra til formann/forkvinnu.

Próvtøkunevndin skipar fyri próvtøkum fyri løggildar grannskoðarar, og hevur Próvtøkunevndin saman við Skráseting Føroya heimild til at gera avtalu við Erhvervsstyrelsen og FSR um samstarv í samband við próvtøkuhald og próvtøkudøming.

Próvtøkunevndin og Skráseting Føroya kunnu góðkenna eina próvtøku, sum Erhvervsstyrelsen og FSR hava skipað fyri, tá ið próvtøkan samsvarar við krøvini í § 8 í próvtøkukunngerðini. Tað merkir, at um tú hevur staðið skrivliga partin av útbúgvingini til statsautoriseraðan grannskoðara í Danmark, hevur lokið prógv í føroyskum skattarætti, og annars lýkur treytirnar í grannskoðaralógi

so kanst tú søkja um at gerast løggildur grannskoðari í Føroyum[3].

Tað er Próvtøkunevndin ið viðgerð klagur viðvíkjandi próvtøkur og próvdøming, og kunnu avgerðir hjá Próvtøkunevndini ikki leggjast fyri annan fyrisitingarligan myndugleika, sbr. § 31, stk. 8 í grannskoðaralógini.

## Serlig undantøk

Skráseting Føroya kann í serligum førum geva undantak frá tilmeldingarfreistini.

Próvtøkunevndin kann, tá ið heilsulig ella onnur viðurskifti geva høvi til tað, og eftir eina grundaða umsókn, játta einum umsøkjara eyka tíð til próvtøkuna. Viðurskifti, ið kunnu grunda einum undantaki kunnu til dømis vera likamligt brek, sjúka ella orðblindni.

Próvtakarin ber sjálvur ábyrgdina fyri, at viðurskiftini eru skjalprógvaði í samband við umsóknina, til dømis við læknaváttan, ið útgreinar tørvin fyri eyka tíð til próvtøkuna. Ynskir próvtakarin at biðja um meira tíð vísandi til orðblindni, so skal hetta skjalprógvast við orðblindatest.

---

[3] Sí “Treytir fyri at gerast løggildur grannskoðari.”

Umsóknin til Próvtøkunevndina skal sendast til Skráseting Føroya, so vítt tað er møguligt innan tilmeldingarfreistina 1. juni í próvtøkuárinum.

## Treytir fyri at gerast løggildur grannskoðari

Sambært § 3, stk. 1 í grannskoðaralógini kann Skráseting Føroya góðkenna ein persón sum løggildan grannskoðara, um viðkomandi:

1. hevur bústað í Føroyum, ella er fevndur av reglunum í Hoyvíkssáttmálanum um niðursetурrætt og tænastuveitingar,
2. er myndugur og ikki undir verju,
3. ikki er undir endurskipanarviðgerð ella trotabúsviðgerð,
4. ikki er álagdur trotabúsbann ella innan fyri tvey tey seinastu árini hevur verið álagdur trotabúsbann,
5. hevur staðið próvtøkuna fyri góðkendar grannskoðarar *ella* skrivliga partin av útbúgvingini til statsautoriseraðan grannskoðara í Danmark,
6. í minsta lagi 3 ár eftir at hava fylt 18 ár serliga hevur tikið lut í uppgávum, ið viðvíkja grannskoðan av ársroknskapum, samtøkuroknskapum ella samsvarandi roknskaparfrágreiðingum, og
7. er tryggjaður móti fíggjarligum krøvum, sum kunnu standast av at fremja uppgávur sambært § 1, stk. 2 og 3.

Skráseting Føroya kann nokta góðkenning um viðkomandi er frádømdur rættin at virka sum grannskoðari sbr. § 78, stk. 2 í revsilógini, um viðkomandi hevur sýnt slíkan atburð, at orsøk er at halda, at viðkomandi ikki fer at røkja uppgávuna sum álitisumboð hjá almenninginum á fullgóðan hátt, ella um viðkomandi hevur eina falna skuld til tað almenna upp á 50.000 kr. og meira, sbr. § 3, stk. 6 í grannskoðaralógini.

Tá ið tú hevur staðið próvtøkuna sum góðkendur grannskoðari skalt tú lata Skráseting Føroya eina trú- og heiðursváttan, har tú váttar at tú lýkur omanfyri nevndu krøv. Við váttanini skal fylgja avrit av tryggingarskjali og revsiváttan. Um treytirnar eru loknar, verður tú tilnevnd/ur sum løggildur grannskoðari.

Umsóknarblaðið er tøkt á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya.

## Leinkjur

FSR – Foreningen for Statsautoriserede Revisorer: https://www.fsr.dk/

FSR – Reglur viðvíkjandi skrivligari próvtøku: https://www.fsr.dk/uddannelse-events/revisoreksamen/om-revisoreksamen/retningslinjer

Erhvervsstyrelsen: https://erhvervsstyrelsen.dk

Grannskoðaralógin: https://logir.fo/Logtingslog/45-fra-11-05-2009-um-godkendar-grannskodarar-og-grannskodanarvirkir-grannskodaralogin

Próvtøkukunngerðin: https://logir.fo/Kunngerd/121-fra-23-08-2022-um-provtoku-oa-fyri-godkendar-grannskodarar